



Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-17.00
og sunnudagar kl. 14.00-17.00
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM
Telefon nr. 317900 · Telefax nr. 319790
www.nlh.fo · e-mail: nlh@nlh.fo

## TILTØK MAI 2004

**Framsýningin „Veiðimentan" er á Etnografisk Museum í Stockholm**

LEYGARDAGUR 01. MAI
**Kl. 10.00** **Vaskikonudagur (FO)**
- fyriskipari er Tora Tourist v/Sámal Bláhamar

SUNNUDAGUR 02. MAI
**Kl. 16.00** **Konsert við manskórinum ERNIR frá Vestfjørðinum í Íslandi**
Ókeypis atgongd, øll eru vælkomin. Kórið brúkar høvið til at takka føroyingum fyri hjálpina í samband við skalvalopið á Flateyri í 1995.
Kvartettin Kamerata luttekur. Ernir hava verið so hepnir at fingið Tórshavnar Manskór at syngja nakrar sangir til konsertirnar.
Bjarni Restorff stjórnar Tórshavnar Manskóri.
Maria Jolanta Kowalczyk stjórnar, og Elzbieta Anna Kowalczyk spælir klaver

TÝSDAGUR 04. MAI
**Kl. 09.00** **Ráðstevna (FO) „Faroe Islands Exploration Conference 2004"**
- fyriskipari Jarðfrøðissavnið

MIKUDAGUR 05. MAI
**Kl. 09.00** **Ráðstevnan (FO) „Faroe Islands Exploration Conference 2004"**

HÓSDAGUR 06. MAI
**Kl. 20.00** **Orfeuskonsert**
Anna Klett (FO) klarinett, Peter Morrison (DK) sello og Jóhannes Andreasen (FO) klaver.
Atgongumerki á 80.- fáast í Húsinum

FRÍGGJADAGUR 07. MAI
**Dýri Biðidagur - húsið er opið sum sunnudag**

LEYGARDAGUR 08. MAI
**Kl. 14.00** **MenTón (FO) Aðalfundur.**

MÁNADAGUR 10. MAI
**Kl. 08.30** **Javnstøðuráðstevna (FO)**
- 10 ára hald fyri javnstøðulógini í Føroyum. Røðarar verða m.a Vígdis Finnbogadóttir, Ísland. Sí nærri á okkara heimasíðu. Fyrireikari er Javnstøðunevndin.

SUNNUDAGUR 16. MAI
**Kl. 16.00** **YNDI (FO) Balletframsýning.**
Árliga næmingaframsýningin. Atgongumerki vaksin 70.- / børn 30.-kr eru at fáa í Húsinum.

HÓSDAGUR 20. MAI
**Kristi himmalferðardagur - húsið er opið sum sunnudag**

LEYGARDAGUR 22. MAI
**Kl. 19.30** **Stjørnubreytin 2004 (FO) , evnarík ungfólk framføra tónleik og sang.**
Fyrirskipari er Pegasus. Atgongumerki á kr. 125.- eru at fáa í Húsinum og Kunningarstovuni í Havn.

LEYGARDAGUR 29. MAI
**Kl. 16.00** **Konsert við Siloa Kórinum í Fuglafirði.**

SUNNUDAGUR 30. MAI
**Hvítusunnudag er stongt.**

MÁNADAGUR 31. MAI
**2. Hvítusunnudag er stongt.**

**Norðurlandahúsið er opið gerandisdagar kl. 10.00-18.00 og sunnudagar kl. 14.00-18.00**

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
**Telefon nr. 317900. Telefax nr. 319790**
**www.nlh.fo e-mail: nlh@nlh.fo**

# UNGDÓMLIGT STJØRNUROK



**Leygarkvøldið 22. mai verður eitt nýskapandi og áhugavert tiltak í Norðurlandahúsinum, har íðin og talentríkur ungdómur fer á pallin**

Tiltakið er skipað sum ein samanhangandi leiksýning, sum gevur úrmælingum í aldrinum 13 til 18 ár ein serstakan møguleika at trína fram innan tónlist, sang, kór, dans, undirhald, gittarspæl, hornblástur, rytmiskan og klassiskan tónleik.

Tað er Studio Pegasus í Klaksvík, sum skipar fyri Stjørnuroki í Norðurlandahúsinum 22. mai. Tiltakið verður á einum breiðum mentanarligum grundarlagi og fyrireikararnir siga seg vóna, at tað fer at skapa eitt nýtt og hóskandi forum, har ljós verður varpað á ungu føroysku kjarnuna í dag og kann frameftir gerast ein týðningarmikil pallur hjá tannáringum í Føroyum, sum hava sett sær bjørt mál fyri framtíðina.

Ætlanin er at pallseta tvær til fýra konsertir, har ljóðgóðska og pallmyndir ganga upp í eina hægri eind, sum ikki byggja á kapping, men har øll tey luttakandi kunnu standa fram sum sigursharrar við sínum egnu evnum og íðin-skapi.

Samskipari av tiltakinum er Steintór Rasmussen og Fróði Vestergaard umboðar Norðurlandahúsið. Sigrid Sivertsen er kór og sang-leiðari, Jonleif Thomsen fyriskipar tónleikin og Jóna K. Thomsen tekur sær av koreografi og pallmyndum.

**Á pallinum í Norðurlandahúsinum verða:**
- Heiðrun Petersen, violin
- Kristina Dalsgarð og Hilmar Kass, klaver
- Steingrímur Joensen, breakdans
- Brandur Enni, Connie Kass, Heini Gilstone Andersen og fleiri solosang
- Benjamin Petersen, gittari
- Tónleikararnir í Paradox
- Ung Stjørnuskot, sang og kór
- Jóannes Lamhauge, kendur frá sangleikinum Josef, sang & gittar,
- Ung blásarakvintett við m.ø. Dáva Juul Magnussen

# Á LEIÐINI TIL JAVNSTØÐU



**Tíggju ár eru liðin, síðan javnstøðulógin við tógvi stríð kom í gildi í Føroyum. Í hesum sambandi verður skipað fyri stórari javnstøðuráðstevnu, ið ger støðuna upp, lítir aftur og frameftir**

Tað var við bit og samgonguslit, at javnstøðulógin loksins kom í gildi í 1994, og tað í sær sjálvum er prógv fyri, at javnstøða millum kynini ikki er nøkur sjálvfylgja. Men hví skulu vit hava javnstøðu, hvussu langt eru vit komin, og hvussu skulu vit koma víðari, eru millum mongu spurningarnir, sum javnstøðuráðstevnan tekur upp.

Millum navnframu gestirnar er Vígdis Finnbogadóttir, fyrrverandi forseti Íslands, ið hevur verið ein altjóða ímynd av javnstøðu, politiskt og arbeiðsliga.

Í Føroyum var Marita Petersen, sála, Føroyar fyrsti kvinnuligi løgmaður, og hon verður mint og heiðrað á ráðstevnuni. Hennara floksfelagi Vilhelm Johannesen flytir fram røðu, og løgtingsformaðurin fær handað málning av Maritu Petersen, sum Eyvindur Mohr hevur málað.

Annars vera nógvar síður av javnstøðu málaðar. Henning Dyremose, stjóri í Tele Danmark, umrøður góða kvinnuliga leiðslu í TDC. Bjørt Samuelsen, journalistur, umrøður strævna burðin, tá ið javnstøðulógin varð til. Og Jóhanna Berg, sølustjóri á Kósini, tosar um dreymin, sum gjørdist veruleiki, tá ið hon fekk leiðarastarv í fiskivinnuni.

Av øðrum tættum kunnu nevnast líkaløn, javnstøðuvisjónir, framtíðar javnstøða og javnstøða út frá einum kristnum sjónarmiði, og sjálvandi verður landsstýrismaðurin við javnstøðumálum, Hans Pauli Strøm, eisini við á stevnuni.

Eivør Pálsdóttir vísir við sínum sangi, hvussu yvirlegnar kvinnur í grundini kunnu vera, áðrenn Annika Wardum Joensen dregur saman um við spurninginum „Skulu vit taka lógvatak".

Ráðstevnan byrjar 10. mai klokkan 8.30, og fyrireikari er Javnstøðunevndin.

## KONUR VIÐ SÁPU OG SPANN Á ARBEIÐARADEGNUM

**Altjóða arbeiðaradagin verður skipað fyri einum serligum vaskikonudegi í Norðurlandahúsinum**

Um Norðurlandahúsið verður vaskað upp og niður hendan dagin skal vera ósagt, men 1. mai skipar Tora Turist Traffic fyri einum heilt serligum vaskikonudegi í Húsinum.

Skipað hevur verið fyri fleiri líknandi tiltøkum serliga ætlað konufólkum seinnu árini, og felags fyri



tiltøkini hevur verið, at undirtøkan hevur verið góð. Nú er tørnið komið til vaskikonurnar, og dagurin byrjar spakuliga klokkan 9 um morgunin, tá ið Norðurlandahúsið letur upp. Fólk hittast og fáa sær ein drekkamunn, áðrenn skráin byrjar klokkan 10 við fyrilestrum og undirhaldi.

Givist verður klokkan 14. Altjóða arbeiðaradagurin verður virdur, og tí er skráin løgd soleiðis til rættis, at allar vaskikonurnar eisini kunnu fara á felagsfundin, sum er á Vaglinum klokkan 15. Fleiri handlar í býnum hava hendan dagin eisini serlig tilboð til vaskikonur, ið eru við til tiltakið.

Um kvøldið verður hugnakvøld á Hotel Føroyum við skemti, undirhaldi og góðum vinningum. Fyrireikararnir leggja afturat, at menn sjálvandi eisini eru vælkomnir.

## ORFEUS



Beethoven, Lutoslawski og Brahms eru á skránni, tá ið Orfeus skipar fyri konsert í Norðurlandahúsinum hósdagin 6. mai klokkan 20. Tað vera Anna Klett, klarinett, Peter Morrison, sello, og Jóhannes Andreasen, klaver, sum spæla á konsertini.

Eftir Ludvig van Beethoven (1770-1827) verður tann sonevnda „Gassenhauer-trioin" spæld. Talan er um Trio fyri klarinett, sello og klaver B-dur, opus 11. Stykkini eru Allegro con brio, Adagio og Thema: Pria ch'io l'impegno (Allegretto).

„Dance Preludes" fyri klarinett og klaver eftir Witold Lutoslawski (1913-1994) verður síðan framførd. Stykkini eru Allegro molto, Andantino, Allegro giocoso, Andante og Allegro molto.

Síðan verður stegður og eftir stegðin er Johannes Brahms (1833-1897) á skránni. Spæld verður Trio fyri klaver, sello og klaver a-moll, opus 114. Stykkini eru Allegro, Adagio, Andantino grazioso og Allegro.

Konsertin verður í Klingruni 6. mai klokkan 20, og atgongumerkini kosta 80 krónur.

## ÍSLENDINGAR SYNGJA FØROYINGUM TØKK

Karlakórið Ernir vitja Føroyar næstu dagarnar, og sunnudagin 2. mai eru allir føroyingar bjóðaðir vælkomnir í Norðurlandahúsið at lýða á

Íslendingar hava ikki gloymt føroyingum dyggu gávuna, sum varð latin eftir skalvalopið á Flateyri í 1995, og við konsertferð í Føroyum vil Karlakórið Ernir við sangi takka fyri hjálpandi bróðurhondina.

Karlakórið Ernir varð stovnað í 1983, tá ið tvey kór vóru løgd saman. Tey vóru Karlakórs Ísafjarðar og Karlakór Ægis úr Bolungarvík, og sostatt hevði Ernir 20 ára dag í 2003. Í 2003 eru Karlakór Tineyrar uppí, og á føroyaferðini telist Karlakórið Ernir 40 mans.

Karlakórið Ernir kemur til Føroya 30. mars, teir fara avstað aftur 3. mai og hava tvær konsertir. Fyrra konsertin verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygardagin 1. mai klokkan 20, og ta konsertina hevur Stranda Ítróttarfelag fingið í lag.

Seinna konsertin verður í Norðurlandahúsinum, og tá eru allir føroyingar vælkomnir at hoyra takkarsong fyri hjálpina í 1995.

Kvartettin Kamerata syngur við báðar konsertirnar, og Ernir hava eisini verið so hepnir at fingið Tórshavnar Manskór at syngja nakrar sangir. Bjarni Restorff stjórnar Tórshavnar Manskóri. Maria Jolanta Kowalczyk stjórnar Karlakórinum Ernir, og Elzbieta Anna Kowalczyk spælir klaver.

Konsertin í Norðurlandahúsinum verður sunnudagin 2. mai klokkan 16 og er ókeypis.

## YNDISLIGIR NÆMINGAR

Árliga balletframsýningin hjá Yndi, har næmingar sýna fram tað, teir hava lært, verður í Norðurlandahúsinum sunnudagin 16. mars klokkan 16.

Atgongumerkini kosta 70 krónur fyri vaksin og 30 krónur fyri børn og eru at fáa í Húsinum.